# Árligu fimleikaframsýningarnar hjá Havnar Fimleikafelag

**Árligu framsýningarnar hjá Havnar Fimleikafelag verða tríggjar í tali. Felagið hevur valgt at kalla tær Framsýningin fyri BØRN, fyri UNG og fyri VAKSIN. Fyri BØRN og UNG verða leygardagin 29. mars ávikavist kl. 14.30 og kl. 18.00 og fyri VAKSIN mánadagin 31. mars kl. 19.00. Allar í høllini á Nabb**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Havnar Fimleikafelag hevur aftur í ár havt eitt innihaldsríkt fimleikaár. Liðini hjá felagnum eru full sett, tiltøkini sum felagið hevur skipað fyri, eru væl vitjaði bæði av fimleikarum og áskoðarum, Stórkappingarliðini vunnu 3 gull og 1 silvur av 4 møguligum og kvinnurnar skulu til Danmarkar, at royna seg í DM í rútmiskum fimleiki. Í stuttum eitt hendingaríkt ár.

### FM í amboðsfimleik

Hóast árligu framsýningarnar verða nú, so er fimleikaárið ikki heilt liðugt, tí enn mangla FM kappingarnar í amboðsfimleiki. Hesar verða fyri yngru deildirnar 3 og 4 mai og eldru deildirnar 9 til 11 mai. Spennandi verður at síggja, hvussu hildnast har.

### Summarfimleikur.

Felagið liggur ikki heilt stilt, hóast vanligu liðini fara í summarsteðg. Felagið hevur í fleiri ár, havt summarfimleik fyri vaskin og verður einki undantak í ár. Summarfimleikur - Kom í form — verður hvørt mánakvøld og mikukvøld báðar dagar kl. 18.00 — 19.15. Kostnaður er kr. 30,- fyri hvørja ferð og er ikki neyðugt at melda seg til áðrenn, ein møtur bara upp. Byrjað verður mikudagin 23. apríl og seinasta venjing verður mikudagin 4. juni.

Ætlanin var eisini at hava summarfimleik fyri børnum, men av ymiskum orsøkum er hetta ikki komið í rættlag enn. Um so verður, verður lýst við hesum seinni.

### 3 framsýningar í ár

Eins og onnur feløg í Havnini hava staðfest, so er umráðandi at stytta um árligu framsýningarnar, soleiðis at hesar gerast meira áskoðaravinarligar og ikki minst styttri fyri fimleikararnar. Hetta hevur verið ynski í longri tíð og hava vit í ár valgt at royna 3 framsýningar ístaðin fyri tær vanligu 2.

Sum sagt eru hesar býttar upp soleiðis at framsýningin fyri Børn verður leygardagin 29 mars kl. 14.30 og er aldurin 1 1/2 ár til 2 fl. Framsýningin fyri Ung verður leygardagin kl. 18.00 og er aldurin tá 2. fl. — 6 fl. Til seinast verður framsýningin fyri Vaksin mánakvøldið kl. 19.00 og eru tað tá 7.fl. og eldri sum vísa ein part av tí tey hava vant í vetur.

### Stuðlar

Til seinast vil felagið nýta høvið, at takka øllum sum á ein hvønn hátt hava stuðlað felagnum, uttan tykkara stuðul bar als ikki til at reka fealgið, sum vit gera í dag. Takk fyri øll somul.

**Nevndin**





*Høgni Klein og liðfelagarnir úr Kyndli høvdu lætt spæl, tá teir mikukvøldið høvdu vitjan úr Hoyvíkini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kyndil-H71 35-23 (17-6):

# Leikandi lætt hjá Kyndli

**Hoyvíkingar tykjast fullkomuliga at hava mist luftina, og mikukvøldið kundi talan verið um satt sorl, hevði Kyndil ómakað sær eitt lítið sindur**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Grannauppgerð var í ítróttarhøllin á Hálsi mikukvøldið, tá H71 vitjaði Kyndil.

Mangan hava dystirnir millum hesi liðini verið ein sonn ímynd av lokaluppgerðum, har leikarar hava ofrað seg fult og heilt í royndunum at knógva hvørjum øðrum.

Men so var ikki mikukvøldið. Langt ífrá.

### Lætt spæl

Frá fyrsta bríksli var nevnliga greitt, at her fór talan at gerast um greiðan Kyndilssigur. Ikki endliga tí at teri grønu vístu so øgiliga nógv, men heldur tí hoyvíkingar vístu so ræðuliga lítið. Ikki so mikið sum stríðsviljin, ið annars ofta hevur eyðkent liðið, var at síggja. Tað tóktist ikki, sum um nakar av leikarunum vildi nakað, og spælið var av slíkum óskipaðum slag, at teir heldur ikki megnaðu nakað.

Og hetta gjørdi Kyndil sær dælt av. Eina mest tí liðið er samansett av somikið sterkum individualistum. Óskipaða hoyvíksverjan gav gott rásarúm til hesar, og hóast Levi Nybo hevði fleiri góðar bjargingar, so fekk hann ikki gjørt stórvegis til tess at bjarga liðnum nakað sum helst.

### Eftir vild

Sum dysturin leið, so tóktist størsti áhugin í høllini at snúgva seg um, hvussu mundi gangast á Skála og í Vestmanna, har ávíkavist StÍF og VÍF bæði vóru aftan fyri eina løtu. Helst mundu leikararnir hjá Kyndli eisini hava hetta í huga, og í øllum førum fóru teir heilt niður á sama gear sum hoyvíkingarnir í senna hálvleiki.

Eitt langt skifti sluppu hoyvíkingar eisini at minka um munin, og hjá nøkrum hómaðist kanska ein vón um stig, tá teir eftir níggju minuttum høvdu minkað úr 26-12 til 27-21, men so gekk tað heldur ikki longur. Fyri líka sum at seta alt upp á pláss, skifti Kyndil aftur gear, og var leyst og liðugt.

### Dýrir stigamissir

Meðan greiða tapið - og hátturin hetta kom uppá – helst avspeglar støðuna hjá H71, nú teir mest sum einki hava at spæla fyri, so man støðan kennast nakað øðrvísi hjá Kyndli. Einki er at ivast í, at bæði leikarar og viðhaldsfólk kunnu vera fegin um góðu úrslitini í endaspælinum, men hinvegin munnu tey samstundis iðra seg um grundspælið.

Her tapti Kyndil fleiri stig av slagnum, sum vanliga verða rópt óneyðug, og hesi kunnu helst vísa seg at gerast dýr. Men hinvegin, so er gull í steypakapping og eitt heiðursmerki í landskappingini nokk ikki at forkasta. Og slettis ikki, soleiðis sum tað annars sá út hjá Kyndli fyri bara trimum mánaðum síðani.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-H71 35-23 (17-6)**
Málskjúttar:
Kyndil: Janus Einar Sørensen 8(3), Finnur Hansson 7, Hans Áki Dal-Christiansen 6, Høgni Klein 5, Josef Abrahamsen 4, Ken Zachariasen 2, Rúni Mohr 1(1), Leif Mikkelsen 1, Jacob Jónsson 1
H71: Niels Viggo Niclasen 10(1), Johnny durhuus 5, Halgir Dahl Olesen 4, Uni Wardum 2, Kristian Eli Zachariasen 1, Brandur Johannesen 1
Brotskøst: Kyndil 6, H71 3
Útvísingar: Kyndil 3, H71 5
Diskvalifikatión: H71 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Tjaldri: Hartvig Joensen og Kári Hansen. Høvdu ikki stórvegis at gera.

# Tey yngstu skulu kappast

Um vikuskiftið skipar Flogbóltssambandið fyri FM-kapping fyri yngru flogbóltsleikararnar.

Kappingin verður hildin í Tórshavn, og hava í alt eini 95 lið boðað frá luttøku, og er hetta største tal av liðum, sum nakran tíð hevur boðað frá luttøku til kappingina.

At talið av liðum er somikið stórt, setir sjálvandi eisini krøv til umstøðurnar. Til samans skulu á leið 250 dystir leikast, áðrenn vinnararnir eru funnir, og verða dystirnir leiktir í Hoyvíkarhøllini, Gundadalshøllini og í Eysturskúlanum.

Kappast verður leygar- og sunnudagin, og tá øll úrslitini eru greið, fáa fremstu liðini í ymsu aldursbólkunum steyp og skreytlutir frá høvuðsstuðlinum hjá FBF, Sparikassanum.

**-jm**



# Dráttur kappingin

**45 lið tóku lut, tá seinata flogbóltskappingin hjá teimum vaksnu varð leitk um vikuskiftið. Hetta fór sum vant fram í Giljanesi, har tað í nógv ár hevur verið siður, at flogbóltsleikarar siga kappingarárinum farvæl. Niðanfyri prenta vit myndir av vinnarunum í ymsu bólkunum**



*Hjá næstbestu kvinnunum gjørdist Fleyr vinnari framman fyri Mjønir og Dráttur*



*Eisini næst bestu menninir hjá Fleyr vunnu sín bólk. Royndu harrarnir vunnu framman fyri Fleyr B og SÍ*



*Mjølnir úr Klaksvík endaði framman fyri SÍ og liðið hjá Formula í kappingin hjá 2. deild kvinnur*



*Sørvingar vunnu 2. deild hjá monnum. Her gjørdist Nøvan nummar tvey, meðan Fram vann triðja plássið*



*Menninir hjá ÍF tóku sær eisin iav seinasta gullmerkinum á árinum, sum teir vunnu framman fyri SÍ og Mjølnir*



*Eftir hópin av silvurmerkjum gjøgnum árið, eydnaðist tað loksins kvinnum hjá Mjølni at vinna gull. Tær endaðu framman fyri ÍF og Fleyr*

# Framsýning í Runavík

**Bæði leygar- og sunnudagin fer Støkk at hava fimleikaframsýningar í Runavík**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Komandi vikuskifti verða árligu framsýningarnar hjá fimleikafelagnum Støkk í ítróttarhøllini í Runavík. Á skránni eru, umframt vanligu liðini hjá Støkk, fýra rútmisk fimleikalið, sum øll luttóku í Stórkappingini í ítróttarhøllini á Kambsdali, og harafturat reiðskapsfimleikur á høgum støði. Fimleikararnir hava vant allan vetur og eru tí sera spentir at vísa síni kynstur fram.

Framsýningarnar hjá Støkk hava altíð verið væl vitjaðar, og er áhugin vaksin seinastu árini. Tí hevur nevndin hjá Støkk gjørt av at hava tvær sýningar í ár. Hin fyrra verður leygardagin 29. mars kl. 16.00 og tann seinna sunnudagin 30. mars kl. 16.00. Nálir og ídnisprógv verða handað sunnudagin.

Meðan framsýningarnar eru, verður stórt páskatombola í gongini, har ymiskt páskaprýði og páskaegg verða at vinna. Møguleiki verður eisini at ogna sær tær væl umtóktu støkktaskurnar, sum tað enn eru nakrar eftir av.

Fimleikaframsýningin sunnudagin verður tikin upp á sjónband, og tá framsýnginin er, verður eisini møguleiki at bíleggja sær eitt av hesum.

Fimleikararnir gleða seg til framsýningarnar, og vóna øll í Støkk at síggja systkin, foreldur, ommur og abbar, vinir og kenningar, umframt øll onnur fimleikaáhugað í ítróttarhøllini í Runavík 29. og 30. mars.



*Á myndini síggja tit fimleikarar úr Støkk kýta seg til fimleikafagnaðin, sum Støkk vann í Norðurlandahúsinum í november 2002.*